Filmsvika



*Bergur Johannesen ummælir*

# Ein sjúklig familja

**Lítli Allan er einasta vónin um nakað, ið líkist einum vanligum persóni í Johannesen familjuni. Hóast syrgiligir, eru løgnu persónarnir sera stuttligir at fylgja**



**»KUNSTEN AT GRÆDE I KOR«**

★★★★★☆

- Í okkara familju ræður um at vakja um náttina, tí tá er tað, pápi fær síni nervasamanbrot...

Soleiðis greiðir skilagóði piltanurin, Allan frá. Pápin er sálarliga veikur og hóttir við sjálvmorði í heilum. Mamman má taka sovibollar fyri at fáa svøvn, og lítli Allan ansar eftir pápanum. Systurin plagar at leggja seg hjá honum, og familjan góðtekur hesa skemd, fyri frið skyld.

Filmurin er heilt ófatiliga væl greiddur úr hondum. Sjónarhornið liggur hjá lítla høvuðspersóninum, ið ger alt fyri at bjarga familjuni. Frá hansara sjónarhorni er ábyrgdin stór og eisini hansara – hóast øll familjan er langt úti.

Søgan gongur fyri seg í einari lítlari jútskari bygd í 70'árunum. Samfelagsviðurskiftini eru væl lýst, har tildømis sjálvtøkuhandilin er eitt nýtt fyribrigdi. Somuleiðis eisini persónarnir og upplýsingin á teimum døgum.

Vit hitta sálarliga sjúka pápanum, uppgevandi mammuna, veiku systrina, vaksna beiggjan, ið er fluttur út og skilagóða Allan, ið bara roynir at fáa alt at hanga saman. Væl samanskrúvaðir persónar, ið byggja eina heild, ið ikki hevði riggað uttan nakran av hesum.

Sera syrgiliga søgan er somikið langt úti, at hon gerst láturlig. Nógvir danskir filmar hava megnað heilt ótrúliga væl at gera nógv við tragikomikk, og hesin er uttan iva millum teir bestu.

# Sálarspillandi drama

**Ísakaldi dramafilmurin um eina einliga mammu, ið ikki ynskti barn sítt. Ein beinleiðis ótespilig uppliving og ein sera vemmiligur filmur**

**»DAISY DIAMOND«**

★☆☆☆☆☆

Anna var 22 ár, tá hon átti Daisy. Tað var ikki ætlan hennara at gerast mamma, og hetta forðar henni eisini, at útliva dreym sín, um at gerast sjónleikarinna. Nógva trýstið, ið hon upplivir sum einlig mamma, leiðir hana í óføri. Vónin um ein stóran leiklut, leiðir hana á skeiva leið, og eingin vegur er aftur.

Ein óhugnaligur, kaldur filmur. Anna starir inn í upptøkutólið og beint at hyggjaranum, og tað rennir tær kalt oman eftir rygginum. Millum veruligu senurnar, sigur hon tær um kenslur sínar, og tað er ótespiligt at hoyra hana greiða frá. Men við eitt uppdagar man, at hon einans er til upptøkuroynd til onkran leik. Hesar køldu kensluleysu løturnar eru sera óhugnaligar og rigga væl.

Søgan sjálv er væl skrivað, men eisini eitt sindur veik. Hetta í tí týdningi, at myndirnar Onnu, tá hon starir inn í upptøkutólið, fylla sera nógv.

Heilt ótrúliga óneyðugar, drúgvar og vemmiligar senur eru gjøgnum allan filmin, og til tíðir er hann meira líkur einum bíligum porno-filmi. Tá rullitekstirnir endiliga koma, liggja orðini, "hvat ólukkan var hatta?" nær at kvalmanum í hálsinum.





# Psykopati í skúlaaldri

**Høvuðspersónurin er torførur at koma at kenna. Viðurskifti hansara eru verulig, men inni í høvdinum er hann als ikki vanligur**

**»UNG MAND FALDER«**

★★★☆☆☆

Hue er eitt sindur øðrvísi enn hini. Hann er tannáringur og um at gerast liðugur í skúlanum. Heima hjá honum liggur mamman á sofuni, og pápan sæst einki til. Hann er neurotiskur perfektionistur og eitt nú rivur er eitt tað versta, ið hann fær. Rundan um onnur gerst hann bangin, og hansara verð er sera órógvandi. Alt samalt, meðan hann roynir at lesa til prówtøkurnar.

Filmingin er frálík, og lýsir væl hendan sálarsjúka drongin. Hyggjarin verður beinavegin settur inn í hansara veikleikar og trongdir. Filmurin er væl gjørdur, og lýsir ein áhugaverdan persón. Søgugongdin er stutt, og fyri so vítt hendir ikki tað stóra.

Endamálið er væl rokkið, við at lýsa hendan persónin og tískil er filmurin góður. Kundi tó innihildið meira fyri at verið meira verdur at minnast.